# Fullveldið forðar flogvøllinum



*Ætlaðu útbyggingarnar á flogvøllinum í Vágum eru fyribils útsettar, tí eingir pengar eru settir av á donsku fíggjarlógini. Ymsar meiningar eru um orsøkina. Flogvallarovastin sigur grundina vera politisku støðuna millum Danmark og Føroyar, meðan Ferðslumálaráðið sigur, at grundin stutt og greitt er tann, at danir hava valt at brúka pengarnar í Danmark*
*Mynd: Edvard Joensen*

*Ætlaðu útbyggingarnar á flogvøllinum í Vágum eru fyribils steðgaðar, tí danir hava ikki hug at gera nakað, fyrr enn politisku viðurskiftini landanna millum eru greið*

EDVARD JOENSEN

**Flogvøllurin:** Líkt er til, at ætlaðu útbyggingarnar á flogvøllinum í Vágum verða seinkaðar, ella í ringasta føri av ongum. Ymsar frágreiðingar eru um orsøkina.

Flogvallarovastin í Vágum sigur seg hava fingið at vita, at politisku samráðingarnar millum Danmark og Føroyar hava gjørt, at danir vilja steðga við útbyggingini.

Fulltrúi í Ferðslumálaráðnum sigur, at grundin er tann, at danir heldur raðfesta íløgur í Danmark enn íløgur í Føroyum.

Úrslitið er í øllum førum, at eingin króna er sett av til flogvøllin í Vágum í uppskotinum til komandi danska fíggjarlóg.

Ætlanir eru frammi um útbygging av flogvøllinum í Vágum. Bæði at leingja vøllin sum er, og at byggja terminalin út, so hann gerst betri førur fyri at avgreiða ta støðugt vaksandi ferðsluna um flogvøllin.

Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti hjá Statens Luftfartsvæsen í Vágum, sigur, at tinginar hava verið við danskar myndugleikar um útbyggingina. Men fyribils er alt steðgað upp, tí eingir pengar eru at fáa.

Finnbogi Niclasen sigur eg hava fingið sum grundgeving, at danir ynskja at bíða við útbyggingini, til teir vita, um teir yvirhøvur eiga flogvøllin, ella um føroyingar fara at yvirtaka hann.

Staturin átti fyrr allar flogvallirnar í Danmark. Men so við og við eru teir lagdir út til ymisk feløg at reka. Í dag eigur staturin bara flogvallirnar á Bornholm og í Vágum.

Men nú er líkt til, at kenslurnar fyri flogvøllinum í Vágum eru munandi kølnaðar í Ferðslumálaráðnum.

Niels Remmer, fulltrúi í Ferðslumálaráðnum, váttar, at eingir pengar yvirhøvur eru settir av til flogvøll í Føroyum á fíggjarlógaruppskotinum til komandi ár.

Niels Remmer sigur, at danir hava nógv at brúka pengar til, og Ferðslumálaráðið hevur ikki so nógv, at nakað er at taka burtur av til føroyingar.

Raðfest er, sigur hann, og avgjørt er at brúka allar pengarnar í Danmark. Har eru vegir og jarnbreytir, sum Ferðslumálaráðið metir hava meira brúk fyri pengum, enn ein flogvøllur í Føroyum.

Niels Remmer sigur, at í Ferðslumálaráðnum verður ikki mett, at brúk er fyri nakrari útbygging yvirhøvur. Hann hevur verið nakrar ferðir í Føroyum, seinast fyri einum ári síðan, sigur hann, og kennir væl til viðurskiftini á flogvøllinum í Vágum.

Teir trupulleikar, sum eru av øktari ferðslu, koma av, sigur Niels Remmer, fulltrúi í danska Ferðslumálaráðnum, at leiðslan á flogvøllinum og feløgini, sum flúgva til Føroya, duga ov illa at leggja flúgvingina til rættis.

Tað er eingin grund til at sprongja flogvøllin við komum og fráferðum í einar tveir tímar, meðan vøllurin so stendur ónýttur hinar 22 tímarnar av samdøgurðinum, sigur Niels Remmer.

Hann heldur, at um flogvallarleiðslan, Atlantsflog og Maersk Air bóru seg eitt sindur skilabetri at, var eingin grund til at tosa um útbygging av terminalinum. Tað hevði verið tað sama sum at bygt høvuðsjarnbreytarstøðina í Keypmannahavn út eftir ferðsluni tollaksmessudag, sigur Niels Remmer, fulltrúi í Ferðslumálaráðnum.

Og sum nú er, eru ongar sum helst ætlanir um útbyggingar á flogvøllinum i Vágum, staðfestir Niels Remmer, fulltrúi í danska Ferðslumálaráðnum.

Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti í Vágum, vísir aftur, at allir trupulleikar verða loystir við at leggja ferðaætlaninar um.

Hann er samdur við Niels Remmer í, at hesin kennir viðurskiftini í Vágum. Og tí veit hann eisini, sigur Finnbogi Niclasen, at í Føroyum eru allar aðrar ferðaætlanir soleiðis, at fólk fara heiman tíðliga á morgni. Tað verið seg suðuroyingar, fugloyingar ella hvaðani tey so koma. Skipini sigla á morgni, og fólk fá ikki verið í Vágum fyrr enn út móti middegi. Tí liggja flogruturnar soleiðis, sum tær gera.

Og tá so ferðafólkini eru komin til Danmarkar og skulu víðari, liggja altjóða ruturnar soleiðis, at tú helst skalt vera í Kastrup ella Billund áðrenn klokkan fýra seinnapart, um tú ætlar tær víðari beinanveg.

Tí nyttar tað einki at leggja fráferðirnar á høvuðsrutunum seinni, enn tær liggja í dag, sigur Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti.

Heldur ikki er so, lætt at leggja tær fyrr á morgni av orsøkum, sum vit í Føroyum ikki ráða fyri, vísir hann á og tekur Billundrutuna hjá Maersk Air sum dømi.

Flogið verður úr Billund til Føroya, eftir at flogførini, sum Maersk Brúkar á hesi rutuni, eru komin aftur av øðrum rutum. Eitt nú London ella Venezia.

So tann grundgevingin, at vit skulu leggja ruturnar um, heldur ikki, sigur Finnbogi Niclasen, sum heldur fast við, at hann hevur fingið at vita, at tað er politiska støðan sum ger, at danir drála við útbyggingini í Vágum.

At Ferðslumálaráðið sigur grundina vera, at teir heldur vilja brúka pengarnar í Danmark enn í Føroyum, tekur hann bara sum eina staðfesting av tí, hann hevur fingið at vita.



## Sjey herverk á bilar

*Løgreglan í Havn hevur fingið fráboðan um herverk á sjey bilar um vikuskiftið*

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað er onkur, sum hevur verið í ringum lag um vikuskiftið, og latið ringa lagið ganga út yvir bilarnar hjá øðrum.

Á støðini í Havn, hevur løgreglan fingið at vita um sjey herverk móti bilum, sum hava staðið við sjónleikarahúsið og niðan móti Viðarlundini.

Vakthavandi á støðini í Havn sigur, at teir enn ikki hava greiðu á, um samanhangur er millum herverkini.

- Í fyrsta umfari fingu vit fimm fráboðanir. Síðani komu tvær afturat, so nú eru vit uppi á sjey. Tær fyrstu komu leygardagin og tann seinasta er komin í morgun, so tað kann merkja, at ikki alt er gjørt í senn, men tað er kortini vónleyst at siga nakað um, kortini.

Í flestu førum er talan um, at rútar eru brotnir. Í ávísum førum hevur tað kortini ikki verið nóg mikið, tí onkrir bilar hava eisini fingið djúpar foyrur í lakkið, so tað er ikki bara sum at siga tað, at fáa hetta gjørt aftur.

Løgreglan í Havn hevur enn onga hóming av, hvør hevur gjørt ógerðina. — Tað hava vit tíverri ikki, so um onkur er, sum veit um okkurt, ella uppaftur betri, um onkur er, sum hevur sæð tilburðirnar, so taka vit fegin ímóti upplýsingum, sigur vakthavandi á støðini í Havn.

## Ferðslutrygd fær blákrossviðurkenningina

Landsnevndin hjá Bláa Krossi Føroya hevur á fundi gjørt av, at Ráðið Fyri Ferðslutrygd skal hava blá-krossviðurkenningina fyri ár 2000.

- Ráðið Fyri Ferðslutrygd fær hesa viðurkenning fyri sítt upplýsandi og ráðgevandi arbeiði um rúsdrekka og ferðslu millum ung, sigur landsnevndin hjá Bláa Krossi í grundgevingini fyri viðurkenningina.

Í hesum sambandi bjóðar Blái Krossur til eina lítla samkomu í dagtilhaldinum „Kafé Blákrosstovan“ í Kongagøtu 8 týsdagin 10. oktober kl. 15.00. Aðalskrivarin hjá Bláa Krossi Føroya fer at handa einum umboði frá Ráðnum Fyri Ferðslutrygd heiðursbræv á samkomuni.

**SíS**




*Jón Kragesteen og tey á Ráðnum Fyri Ferðslutrygd fáa í dag heiðursbræv frá Bláa Krossi fyri upplýsandi og ráðgevandi arbeiði um rúsdrekka og ferðslu millum ung*

## Stemplið avdúkaði hann

*Ein bilførari, sum rýmdi frá einum lítlum ferðsluóhappi um vikuskiftið var avdúkaður, tá løgreglan kom á vitjan. Teir høvdu nummarplátuna við, og á hondini hevði hann eitt stempul frá Club 20 – við dagfesting*

SVEINUR TRÓNDARSON

Eitt stempul frá Club 20 var um vikuskiftið við til at avdúka ein bilførara, sum hevði koyrt eitt skelti niður í Hoyvík. Nú verður maðurin ákærdur fyri rúsdrekkakoyring og fyri at rýma av staðnum, eftir eitt ferðsluóhapp.

Søgan byrjaði við, at maðurin í bili sínum koyrdi á eitt skelti, sum stendur við »oyggjarnar«, sum gjørdar eru í vegin í Hoyvík. Bilførarin hevði eftir øllum at døma ikki so góðan hug at siga løgregluni frá, at hann hevði rent á, tí sum skilst hevði hann smakkað sær á, og tað er ikki loyvt, tá ein koyrir bil.

Tíverri fyri førarin, var hann ikki varugur við, at nummarplátan var dottin av, tá hann rendi á skelti. Tí kann sigast, at hann legði visittkort eftir seg, á staðnum.

Tá løgreglan kom á staðið og fann nummarplátuna, hevði hon lætt spæl. Hon kundi staðfesta at talan var um ein Saab, og vitandi um hetta, koyrdu løgreglumenninir ein túr norðureftir, at vita, um teir fingu bilin aftur.

Tað gjørdu teir ikki. Aftur ímóti koyrdu teir seg fram á ein kúfangara av einum Saab, sum lá á vegnum í Kollafirði.

Nú helt løgreglan í Havn tað ikki vera neyðugt at fara longur og ístaðin setti hon seg í samband við løgregluna í Eysturoynni. Bilurin var heimahoyrandi har, og tí bóðu teir løgregluna í Runavík fara at vitja mannin.

Hon so gjørdi. Tá teir komu til húsini fingu teir at vita, at maðurin var farin til songar. Hann var kortini fingin upp aftur úr seingini, og royndi hann at muta ímóti, at hann hevði verið í Havn, so bar illa til hjá honum. Løgreglan í Havn stóð nevniliga við nummarplátuni til bilin.

Men tað var nú ikki tað einasta. Tí á hondini hevði hann eitt stempul, sum greitt boðaði frá, at hann hevði verið í Club 20 í Havn, júst hetta kvøldið, tí har stóð Club 20 við dagfestingini á. Og tað er ikki á hvørjum degi, at løgreglan fær so góða hjálp til at uppklára eitt ferðsluóhapp…

Upplatingartilboð
í nýggju Telebúðini á Sandi

Gigaset 3010 Classic frá Siemens
Nýklassikarin av tráðleysum telefonum
Siemens hevur enn einaferð gjørt tað! Eina ótrúliga tráðleysa telefon, ið røkkur heilar 300 metrar. Telefonin hevur eitt snøgt snið við einum tíðarleysum miðnáttarbláum liti, ið passar til eitt og hvørt heim...
Fyrr: 1350,- kr.
TILBOÐ! 995,- SPAR 355,- kr.



Nýggja Telebúðin letur upp týsdagin 10. oktober kl. 11.00




TILBOÐ! 1550,-

Ársins pakkatilboð:
Nokia 3210 GSM-telefon við teletíð
Nú kanst tú ogna tær eina Nokia 3210 GSM fartelefon, stovning av Føroya Teletíð og 100,00 kr. ókeypis teletíð fyri lágprís. Telefonin hevur allar tær vanligu teknisku snildirnar umframt innbygda antennu. ***Eitt ótrúligt tilboð til tey, ið vilja siga tað uttan rokning...***

Upplatingartíðir:
**Mánadag til mikudag: Kl. 11.00 - 14.00**
**Hósdag og fríggjadag: Kl. 14.00 - 18.00**

TELEBÚÐIN
Sandur • Tel 36 10 00

petur & petur • 320870